# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo

## Miðbýurin skal verða eitt savningarstað

Bogi Andreasen, varaborgarstjóri sigur, at miðbýurin skal endurnýggjast, og tiltøk setast í verk við tí fyri eyga, at gera miðbýin til eitt savningarstað fyri allar føroyingar

Í samrøðu við Rás2 sigur Bogi Andreasen, varaborgarstjóri í Tórshavnar Kommunu, at kommunan hevur eina langtíðarætlan, um hvussu miðbýurin skal mennast til aftur at verða eitt savningarstað fyri allar føroyingar.

- Tað er eingin loyna, at miðbýurin er vorðin heldur óáhugaverdur at ferðast í, og tískil mugu broytingar til, soleiðis at hann aftur kann verða tað savningarstaðið, ið ein miðbýur skal verða, sigur Bogi Andreasen.

Hetta hevur kommunan eitt boð uppá. Millum annað skal býarbókasavnið í miðbýnum flytast til gonguhædd, og uttanfyri skal verða eitt spælistað, soleiðis at umhvørvið eisini gerst barnavinaligur.

Fyrsta liðið í tilgongdini er ein kafé, ið fyri fyrstu ferð lat dyrnar upp fríggjadagin.

Kafein er í miðbýnum í Havn, og hevur hon millum annað ein stórt uttanduraøki, har til ber at njóta eitt hvørt í hugnaligum umhvørvi og undir hitalampum.

# Rokkarin sum bleiv pápi



Rokkarin úr bólkinum The Dreams, Hans Edward Andreasen, bleiv 31. mars pápi at Klæmint McLeod Andreasen.

Vit kenna hann eina mest frá pallinum, har hann, saman við manningini í The Dreams, hevur bergtikið Føroyar, Danmark og nú Frankaríki. Teir flyta seg alsamt longri inn á altjóða rokkpallin, og framtíðarvónirnar eru stórar fyri hesum ungu føroyingum.

Men 31. mars í ár broyttist lívið hjá Hans Edward, tá ið hann gjørdist pápi í sjúkrahúsinum í Hvidovre, og var tað ein lítil drongur, ið bleiv borin í heim henda síðsta dagin í mars.

Navnið á soninum hjá rokkaranum er Klæmint McLeod Andreasen, og vigaði hann 3472 og var 55 cm langur.

Planet ynskir Hans Edward og maka hansara hjartaliga tillukku við soninum.

Petur Pólson:

## Mín sál er troytt

Petur Pólson hevur í dag avdúkað enn eitt nýtt lag, sum verður at hoyra á nýggju fløguni "Tokyó", ið kemur út seinni í ár. Lagið nevnist "Mín sál er troytt".

Lagið bleiv fyri fyrstu ferð spælt á Rás2 fyri løtu síðani, og verður partur av nýggju fløguni hjá Peturi Tokyó, ið kemur á gøtuna seinni í árinum.

Lagið ber heitið "Mín sál er troytt", og sjálvur sigur Petur soleiðis um lagið.

- Eg kalli tað eitt blues-noise-electro-shoegaze-postrock-chamber-gospel lag. Teksturin er ein blúsutur grenjitekstur, skrivaður og sungin við lungabruna, sigur Petur Pólson.

Nýggjastu løgini hjá Peturi kunnu hoyrast á heimasíðum hansara
*http://www.myspace.com/peturpolson*
*http://www.peturpolson.com*